

*Jens Guð(mundsson), Michael Reveal, Rakul Guðjónsson og Kristian Blak. Jens Guð stóð fyri at fáa út fløguna Rock from the cold seas, sum samtakið Blue'n'Icy stóð fyri. Michael Reveal er handilsligur ráðgevi, nú Rakul og Kristian hava verið á tónleikahandilsferð á Midem í Cannes Mynd: Dagfinn Olsen*

# Handil á netinum - møguleikar og trupulleikar

*Aftur í ár vitjaðu Kristian Blak, Tutl, og Rakul Guðjónsson, umboðandi Blue'n'Icy, á Midem-festivalinum í Cannes. 3'arin luttók eisini. Býurin er gitin fyri filmfestivalin, men á árliga Midem-festivlinum hittast tónleikaáhugað handilsfólk úr øllum heimunum. Í ár var serliga nógv gjørt burturúr handli á internetinum*

Dagfinn Olsen

Tutl var í ár við á 3. sinni og Blue'n'Icy á 2. sinni. Kristian Blak og Rakul Guðjónsson vitjaðu í Cannes. Umboð fyri 3'aran í SMS var eisini í Cannes.

Til midem-festivalin hittast handilsfólk innan tónleikaídnaðin úr øllum heiminum.

Kristian Blak umboðaði Tutl og Rakul Guðjónsson Blue'n'Icy, ið er samtak av 5 forløgum í Útnorði.

Millum úrslitini her er fløgan Rock from the cold seas, sum Jens Guð savnaði. Jens sendir sum nú er norðurlendskan tónleik á lokal støð í Íslandi. Hann skal nú eisini senda í Ríkisútvarpinum og hann leggur fyri við at senda føroyskan tónleik.

## Netið

Serstakt við Midem í ár var, at serstakliga var gjørt burturúr handli á alnótini ella internetinum.Tess møguleikar og trupulleikar.

Fyri 10 árum síðani keyptu vit LP-plátur. Nú keypa vit fløgur, men tey, ið fylgja best við, taka tónleik av alnótini - teir sonevndu MP3 fílarnar.

Nakað hevur verið við, at ólógligt er at taka hesar fílar niður, men arbeitt verður við at fáa hetta gjørt lógligt, sigur Kristian Blak.

Rakul vísir á Popwire, ið tekur tónleikarar á gøtuni og bjóðar teimum ókeypis pláss á netinum við sínum løgum ella øðrum tilfari. Hetta kunnu onnur so taka niður av netinum. Talt verður so upp, hvat verður mest vitjað og tann áhugaverdasti verður so boðin fram til okkurt forlag. Men leggur ein út hjá Popwire, eiga teir rættindini og gera sum teimum lystir. Hendir nakað stórt, so eiga teir eisini part av køkuni.

Stereonet í Danmerk er líknandi fyritøka, men tó eru ikki so nógvar bindingar hjá teimum

Yvirhøvur er ein tann størsti trupulleikin júst nú, at so mong millumlið eru á vegnum hjá teimum, ið royna at vinna fram á netinum.

Kristian metir, at eitt felag sum Tutl er vónleyst at finna á netinum og má Tutl tí leggja seg hjá einum størri útbjóðara og hetta hava teir gjørt. Teir eru hjá útbjóðara í New York, ið sendir út til 75 aðrar útbjóðarar, men prísurin er, at teir taka 30% í ómaksløn.

Hetta vísir trupulleikan við mongu millumliðunum á netinum, ið vilja hava part av køkuni.

## Framtíðin

Men eitt er hvat vit keypa. Annað er hvussu og hvar vit keypa í framtíðini.

Michael Reveal fæst við at ráðgeva fyritøkum í handli og sáttmálum. Hann hevur verið ráðgevi í samband við Midem-ferðina.

Hann sigur eina av orsøkunum til mótstøðuna hjá størri fyritøkum ímóti fría tónleikinum á netinum vera, at gomlu tónleikasáttmálarnir ikki søgdu nakað um digitalan tónleik.

Sáttmálarnir, sum nú verða skrivaðir við nýggjar bólkar, innihalda alt, sum nakar kann hugsast at finna uppá framyvir.

Hann sær fyri sær, at alnótin framyvir verður alt størri og meira innarbeiddur partur av keypi og sølu.

- Fólki dámar væl at fara innar í fløguhandlar. Í framtíðini verður kanska talan um eina heildaruppliving við øllum møguligum, tá ein keypir tónleik. Sum at fara inn á eina café, metir Michael Reveal.

## Kiosk

Kristian, Rakul og Michael eru sannførd um, at tað eru stórar broytingar, ið vit eru í.

Michael vísir á, at í 1959 vístu vísindamenn á, at tól sum t.d. sjónvarp, fax og líknandi fóru bert at hava ein tørv, sum gjørdi, at eini 5000 tól funnust í heiminum. So er ikki í dag, kann ein siga, uttan at siga ov nógv.

Tey meta, at framyvir verður helst gjørligt at fara innar og bíleggja sær tónleik eftir ynski. Men tó fara heildarútgávurnar hjá tónleikarum ikki at hvørva

Tað verður sum at fara í eina kiosk at velja sær tónleik.

Fleiri sonevnd slogans ella orðatøk vóru havd á lofti í Cannes. T.d. „The world to day is as bad as it can ever be“, sæð frá alnótasjónarhorni.

Ella „ It is not the strongest of the species that survive, nor the most intelligent, but the most responsive to change“.

Kristian minnist, at hann helt ongantíð, at fløgan skuldi taka plátuna av ræði so skjótt, sum hon gjørdi. Men hann er sannførdur um, at kreativur tónleikur fer altíð at hava ein miðil, um enn hesin eisini støðugt broytist.

Michael vísir á, at kona hansara fór inn í ein handil og spurdi eftir nótum til ávíst stykki í ávísum duri. Løtu seinni kundi hon fara avstað við hesum.

## Ljós framtíð

Tutl hevur verið á netinum eina tíð, t.d. íhjá kenda sølustaðnum Amazon. Føroyska felagið er sera áhugað í at fyrireika ferðir við tónleikarum, umframt at netið skal fremja sølu.

Ragnar í Vík selir nakað uttanlands. Hann hevur staðið í enskum bløðum og verið á ymsum listum. Men t.d. selja Spælimenninir í Hoydølum nógv í USA og hetta kemur av, at teir fleiri ferðir hava verið á ferð har.

Ætlanir eru um tónleikaferðir í Finnlandi, Íslandi og aðrastaðir, sigur Kristian Blak, og vísir á møguleikan við at fáa t.d. Birgir Enni at borðreiða við fiskarættum á ferðini.

Michael metir, at vit eiga so nógvan góðan tónleik við rót í mentan okkara. Hetta hevur týdning, tí sonevndi world-tónleikurin vinnur fram. Áhugin fyri tónleiki úr ymsum mentanum er vaksandi.

Michael Reveal vísir á River Dance, har írskir dansarar fingu viðrák og vunnu pening í hópatali.

Rakul sigur, at tað kom fram á Midem festivalinum, at MP3 fílarnir ikki bert eru av tí ónda. Børnini eru farin at lurta eftir tónleiki aftur og sita ikki bert og spæla Play-Station.

Tey eru samd um, at framtíðin skal síggjast sum avbjóðingar og møguleikar.

## Norðlýsið 2002

Hugskotini eru mong.

T. d. kom hugskotið á Midem í ár um at hava egnan norðurlandskan bás á Midem í 2002. Umgjørligt, er ætlanin at hava Norðlýsið liggjandi við bryggju beint við Midem-stevnuna, har Birgir Enni kann bjóða øður og norðuratlantiskur tónleikur verður at hoyra. Ætlanirnar eru longu komanr nakað ávegis.

Midem er festivalur, har sambond verða knýtt og fyri at skapa álit, má ein vitja árliga.

Sambond verða knýtt fyri lívstíð og umráðandi er við áliti. Kanska spyrtst okkurt síðani burturúr, tá ein hittist árið eftir.

Framtíðin er ljós, eru Midem luttakararnir samdir um.



# Blue'n'Icy - tónleikur í Útnorði

*Rakul Guðjónsson umboðaði Blue'n'Icy á Midem. Samtakið hevur nýggja og sera aktiva heimasíðu og avgjørt hugsanir um framtíðina innan tónleik og alnót. - Tað er ein samfelagsskylda at syrgja fyri, at vit ikki gerast digitalur eftirbátur, metir Rakul.*

Dagfinn Olsen

Samstarv í Atlantshavi. Blue'n'Icy er samtak av 5 norðurlendskum plátufeløgum. Víðari kann sigast, at hetta er úrslit av ætlan, sum Nora setti í verk.

Hesi hava fingið sær felags búmerki og heiti. Tað bláa er væl skilligt og eisni hetta við ísinum. Bókstavurin „n“ stendur so bæði fyri „and“ og fyri tí norðurlendska.

Millum avrikini er fløgan Rock fram the cold seas, filmurin Frostpop og ávegis er fløgan World from the cold seas.

## Heimasíðan

Rakul Guðjónsson umboðaði Blue'n'Icy á Midem. Har var nógv gjørt burturúr alnótini og júst alnótin hevur týdning fyri Blue'n'Icy.

Nýggja heimasíðan hjá samtakinum er snøgg, aktiv og hevur stóran týdning í samstarvinum út í heim.

- Allar royndirnar og sambondini frá Midem knýta seg ikki at ávísum forlag, men koma tónleikinum í Útnorði til góða, sigur Rakul.

Tað sermerkta við heimasíðuni er, at vitjar ein har, so vitjar ein samstundis øll 5 forløgini í samtakinum.

Nógvir trupulleikar eru við samstarvinum Hav er ímillum og feløgini eru sera ymisk, men møguleikarnir við samstarvinum tróta hinvegin heldur ikki.

- Er ein á netinum, so er ein longu úti í stóru verð, uttan størri hóvasták, sigur Rakul.

Tað er fyritøkan VIT, ið hevur gjørt heimasíðuna, ið er sera aktiv og verður røkt, so hon broytist alla tíðina.

Rakul mælir tónleikaáhugaðum til at vitja síðuna: bluenicy.nora.fo

- Tey fáu á Midem, ið hava áhuga fyri grønlendskum trummudansi, hava óivað eisini áhuga fyri føroyskum dansi, og umboðini eru øll á hesi somu heimasíðu, vísir Rakul á.

Síðani Rakul var á Midem, hevur hon fingið fyrispurningar frá tveimum, ið hon hitti har.

Ein tíðindamaður úr Canada hevur hug at keypa eitt eintak av hvørjari útgávu hjá øllum 5 feløgunum, tí hann skrivar eina bók. Hann er áhugaður í framhaldandi samstarvi. Hin er póllendingur, ið frammanundan hevur samband við Tutl, og sum nú eisini arbeiðir fyri Blue'n'Icy.

## Komu í blað

Nakað annað, sum vísir áhugan hjá útlendingum er, at hóast danir royndu at koma í stevnublaðið á Midem, so eydnaðist tað ikki. Men eftir støðugar royndir, eydnaðist tað at fáa føroysku luttøkuna nevnda.

Tónleikur við rót byrjar at vekja áhuga ymsastaðni í heiminum.

Annað sermerkt, ið hendi í Cannes var, at DR2 hevði samrøðu við Rakul. Hetta tí, at DR2 tosaði við størsta luttakaran. So var eisini áhugavert at hitta tann minsta og vita, hvørji ørindini vóru á Midem.

Rakul metir, at tað í dag ikki snýr seg um at seta nakrar hundraðtúsund krónur í ætlan og so vita, um okkurt kann fáa gjøgnumbrot.

Tað snýr seg hinveg um grundleggjandi heimaarbeiði í PR og at gera vart við seg.

- Heimurin mettast av stóru plássunum og leitað verður nú út í krókarnar, metir Rakul.

Hon sigur, at internet radio er frammaliga. Ofta er býtt upp í ymisk øki landfrøðiliga. Hon vísiti einum slíkum radio á, at Føroyar, ella Atlantsøkið, var ikki á teirra lista. Tá gjørdust tey sera áhugaði og skuldu bøta um hetta.

Sama var galdandi hjá stóru on-line fyritøkuni Phono.

## Digitalur eftirbátur

Ein av metingunum hjá Rakul Guðjónsson, eftir at hava vitjað Midem, er at framtíðin liggur í, at keyparin sjálvur velur sær út tann tónleik, hann hevur áhuga í.

Royndir eru longu gjørdar við hesum á netinum. Keyparar kunnu velja tónleik og kunnu t.d. á henda hátt finna júst røttu gávuna.

Eftir at hava valt, skrivar kundin eitt heiti á fløguna og eina serstaka gávuheilsan.

Rakul metir, at hetta við egnum vali av tónleiki verður framtíðin innan fløgur, men tó hvørva gomlu fløgurnar ikki. Tær koma undir list.

- Tað er ein samfelagsskylda at syrgja fyri, at vit ikki gerast digitalur eftirbátur, metir Rakul.

Hon heldur hava stóran týdning, at føroyingar finna eina leið og eina ætlan, tá tað snýr seg um tónleik og útflutning.

Tað er ikki skyldan hjá einum forlag. Her eiga vit at vísa felags andlit, heldur Rakul. Eingin orsøk er at royna í hvør sínum lag og harvið oyðileggja seg fíggjarliga.

Hon vísir í hesum sambandi á, at heimasíðan hjá Blue'nIcy er eitt hent amboð, sum longu er til taks.

## Áhugaverd tónleikatøl

Sum heild vísa hagtøl, at søla á alnótini er í miklum vøkstri.

Dømi er kendi poppbólkurin Beastie Boys.

Eftir at hava loyvt kundum at gera og velja seg fram til fløgu við teimum løgum, teir vilja sjálvir, er sølan økt 265%, í mun til søluna undan hesi roynd.

Um 19% av øllum lesandi í Europa „downloada“. T.v.s. taka niður av netinum.

Í USA er talið 34% og 72% spæla PC tónleik.

### Útflutningur

Tá talan er um útflutning av tónleiki er USA nummar eitt og Ongland (UK) nummar tvey. Nummar 3 er Svøríki.

Har fáa tey meira inn í skatti (frá tónleikaídnaðinum), enn tey nýta til hetta.

Abba hevur selt 400 milliónir eintøk og koma eftir The Beatles, ið hava selt 1000 milliónir eintøk.




*Nýggja og virkna heimasíðan hjá Blue'n'Icy, ið er týdningarmikil liður til samstarv út í heim. Tey 5 feløgini í samtakinum eru Dat, Sámaland, Tutl, Føroyar, Japis og Bad Taste, Ísland og Ulo í Grønlandi*

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUT.** (Sýnaður 15-10-98) **Skrás.:**13-07-95 **Km.:** 76.000 **Prísur:** 162.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 Xli** **Skrás.:** 24-06-97 **Prísur:** 112.600,- **Garanti**** |
| **TOYOTA CAMRY 2,2 XL** **Skrás.:** 21-12-91 **Km.:** 80.000 **Prísur:** 98.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** **Skrás.:** 05-08-92 **Km.:** 110.000 **Prísur:** 45.600,- |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 Gli** (Sýnaður 01-98) **Skrás.:** 27-08-87 **Km.:** 230.000 **Prísur:** 38.600,- | **TOYOTA HIACE 10 PERS. BUSSUR** **Skrás.:** 16-06-95 **Km.:** 160.000 **Prísur:**138.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,6 GL L/B** **Skrás.:** 21-08-90 **Km.:** 124.000 **Prísur:** 60.600,- | **FORD MONDEO 1,8** **Skrás.:** 07-05-97 **Km.:** 12.000 **Prísur:** 149.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,6 GL** (Sýnaður 14-10-98) **Skrás.:** 01-11-89 **Km.:** 154.000 **Prísur:** 49.600,- | **HONDA CIVIC 1,5 H/B** **Skrás.:** 01-08-98 **Km.:** 26.000 **Prísur:** 119.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 L/B TERRA** **Skrás.:** 27-02-98 **Km.:** 30.000 **Prísur:** 120.600,- **Garanti**** | **FORD FIESTA 1,3** **Skrás.:** 29-04-96 **Km.:** 104.000 **Prísur:** 66.600,- |
| **TOYOTA CAROLLA 1,3 SEDAN** **Skrás.:** 12-02-96 **Km.:** 16.000 **Prísur:** 97.600,- **Garanti*** | **FORD ESCORT 1,6** (Sýnaður 26-03-98) **Skrás.:** 21-05-91 **Km.:** 128.000 **Prísur:** 42.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 Xli H/B** **Skrás.:** 31-10-96 **Km.:** 34.000 **Prísur:** 110.600,- **Garanti*** | **NISSAN MAXIMA 3,0 AUT. GEAR** (Sýnaður 01-12-99) **Skrás.:** 15-12-87 **Km.:** 135.000 **Prísur:** 69.600,- |

Sosialurin - 311820

AVHEINTINGAR-TILBOÐ

| | |
|---|---|
| **FORD SIERRA 1,6 AUT. GEAR** (Sýnaður 01-10-98) **Skrás.:** 01-07-87 **Km.:** 117.000 **Prísur:** 7.000,- | **OPEL KADETT** **Skrás.:** 09-01-87 **Km.:** 152.000 (Sýnaður 01-07-99) **Prísur:** 7.000,- |
| | **MITSUBISHI GALANT T DIESEL** **Skrás.:** 25-08-89 **Km.:** 287.000 **Prísur:** 19.000,- |

SERTILBOÐ
KIA CLARUS
1,8 SEDAN
-í besta standi !!
Skrás.: 16.04.98
Km.: 13.000
Prísur: 98.600,-
Garanti*

VØRUVOGNUR
MITSUBISHI PAJERO VAN
Skrás.: 05-10-95
Km.: 80.000
Prísur: 154.600,-

Støkkið inn á gólvið!

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040